Búskaparráðið
Tíðindaskriv 28. februar 2011

# Óheftur stovnur skal regulera fiskiveiðuna – ikki politikarar

Ein týðandi lykil til varandi búskaparvøkstur er at lata ein óheftan stovn regulera fiskiveiðuna undir Føroyum. Burðardyggari fiskiveiða gevur fiskivinnuni støðugari inntøkugrundarlag og skapar vøkstur. Politiska reguleringin hevur seinastu 15 árini elvt til eitt alt ov stórt veiðitrýst, og heldur gongdin fram, fæst ongin varandi búskaparvøkstur.

Búskaparráðið hevur í dag almannakunngjørt várfrágreiðing sína, sum hesuferð varpar ljós á bygnaðarligar skeivleikar í høvuðsvinnu okkara. Í tí sambandi sigur formaðurin í ráðnum, Thomas Dam:

- Tekin eru um vøkstur í búskapinum, men skal framgongdin vera varandi – og tað er neyðugt – so mugu álvarsligu bygnaðarligu skeivleikarnir í fiskiveiðuni rættast nú.

Búskaparráðið vísir á, at umsitingin av fiskiveiðuni, har politikarar tilluta fiskiloyvi og áseta fiskidagar, er búskaparliga óforsvarlig. Seinastu 15 árini hevur veiðitrýstið sambært kanningum í miðal verið umleið 50-70% hægri enn tað, ið hevði givið mest búskaparliga og lívfrøðiliga. Sæð undir einum hava fiskatilvirking og fiskiveiða eftir botnfiski undir Føroyum at kalla ikki havt avlop seinastu 10 árini.

- Politiska reguleringin má halda uppat og latast einum óheftum stovni, ið tekur atlit at burðardyggari veiðu. Fiskastovnarnir tola ikki, at politikarar regulera, og henda regulering forðar fyri varandi búskaparvøkstri, sigur Thomas Dam, ráðsformaður.

Búskaparráðið mælir til, at leikluturin hjá politiska myndugleikanum verður avmarkaður til m.a. at orða ein yvirskipaðan veiðisetning og at fáast við yvirskipaðar avbjóðingar hjá høvuðsvinnuni.

Her eru nøkur av ítøkiligu tilmælunum í várfrágreiðingini hjá Búskaparráðnum:

- Óheft – ikki politisk – regulering av fiskiveiðuni
- Strika almennan stuðul til fiskivinnuna
- Leggja tilfeingisgjald á tilfeingið
- Strika ásetingar í lógini um vinnuligan fiskiskap, ið forða fyri kapping og fríari tillaging í fiskivinnuni
- Selja fiskiloyvi á uppboði – tó uttan at nerva burðardygga veiðu
- Selja á uppboði nýggj rættindi, t.d. makrelin í føroyskum sjógvi

**Fleiri upplýsingar eru í búskaparfrágreiðingini, ið liggur á www.buskap.fo.**
**Formaðurin í Búskaparráðnum, Thomas Dam, er at hitta á tel. 761003.**